ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 3. september 2009

## Støkk byrjar aftur

**Mánadagin 7. september byrjar fimleikurin aftur í Støkk, og tí verður skipað fyri tilmelding leygardagin frá 13 til 15 í ítróttarhøllini í Runavík**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Serliga hjá teimum yngru liðunum kann roknast við sera stórari undirtøku, so tað ræður um at møta í góðari tíð fyri at tryggja sær pláss á liðnum.

Komandi fimleikavetur hevur Støkk nógv at bjóða bæði royndum og óroyndum íðkarum.

Størsti parturin av fimleikarunum hjá Støkk eru børn og ung, men tey tilkomnu fáa eisini møguleika at røra seg í vetur.

Børnini koma til venjing hvørja viku at spæla, læra og hugna sær saman. Eins og undanfarin ár, hevur Støkk lið fyri børn í øllum aldri.

Umframt tann vanliga fimleikin í Støkk eru nógv kappingarlið eisini á skránni. Til ber at tekna seg til tey flestu kappingarliðini leygardagin 5. september, og so verður skipað fyri eini úttøku seinni.

At íðka fimleik ókir um vælveruna, og styrkir hjartað og blóðrensl. Fimleikafelagið Støkk er fyri øll, bæði ung og gomul.

# Sær øgiligur út

**Símun Samuelsen fekk ein snudd í andlitið, tá hann spældi við Keflavík um vikuskiftið, men hann ber ongan ótta fyri, at hetta fer at ávirka hann leygardagin**



Jákup Mørk

Teir eru skjótir at leggja eftir hvørjum øðrum, spælararnir á landsliðnum.

Eitt av ofrunum á ferðini til Eysturríki er Símun Samuelsen, sum ikki sá alt for snøggur út, tá hann saman við restini av ferðalagnum møtti á flogvøllinum í Vágum mikumorgunin.

Eitt stórt sár prýddi mest sum allan nasaryggin, og eisini á pannuni var okkurt skurslið at síggja.

- Tað er tað, sum kann henda, tá tú spælir fótbólt, og tað hendi so fyri meg leygardagin. Eg var nakað óheppin í einari støðu, og eg smekkaði so andlitið í. Men talan er tó ikki um nakran álvarsligan snudd, so tøa er bara gott.

Og tað er í øllum førum ikki nakað, sum kann forða tær, tá dysturin er á skránni leygardagin?

- Nei, tað skal meira enn so til, sigur Símun Samuelsen.

Frá fjølmiðlum her og heima í Føroyum verður hesin dysturin gjørdur til nakað heilt serligt. Er Eysturríki eisini ein heilt serlig uppliving hjá tykkum spælarum?

- Tað haldi eg meg róliga kunna staðfesta. Bæði hjá okkum spælarum og hjá øllum føroyingum. Søgan sigur okkum jú, at tað var móti Eysturríki, at Føroyar komu á fótbóltskortið, so hjá okkum er hetta nakað eyka, og allir mans vilja verða partur av hesum dystinum.

Og tann javnleikurin, sum tit fingu móti Eysturríki seinast. Gevur hann eisini eina enn størri trúgv uppá, at tit kunnu skapa eitt úrslit leygardagin?

- Sjálvandi. Og sjálvur haldi eg í øllum førum, at vit skulu fara út eftir sensatiónini, hvørja ferð vit fara á vøllin fyri landsliðið, sigur Símun Samuelsen.



**Tað sær ógvusligt út, men sjálvur sigur Símun Samuelsen, at snuddurin á nøsini ikki hevur tað heilt stóra upp á seg**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/ Einslistir

# Eysturríkar hava virðing fyri Føroyum



**- Føroyar eru eitt nógv betri lið, enn fleiri ganga runt og halda, sigur Didi Constantin**



Heri Simonsen

**Didi Constantin var millum áskoðararnar, tá føroyska liðið fyri fyrstu ferð spældi undir leiðslu av Brian Kerr. Og hóast 2-0 tapið heima móti Serbia, helt venjarin seg tá síggja, at føroyska liðið væl kann skapa trupulleikar fyri mótstøðuna**

Við eysturríkska blaðið "Der Standard" sigur Dietmar Constantini: - Føroyingarnir stríðast væl á vøllinum, og teir standa ógvuliga væl og kompakt á vøllinum.

Dietmar Constantini var sjálvur til staðar, tá Føroyar taptu 0-2 á Tórsvølli í juni. Føroyar vístu gott spæl, og komu til nógvar málmøguleikar í tí dystinum.

Der Standard dylur ikki fyri, at eysturríkski fótbóltsalmenningurin krevur, og væntar ein sigur móti einum liði, sum bara hevur fýra spælarar, sum spæla uttanlands.

Dietmar Constantini staðfestir, at tað er rættiliga sjáldan, at eysturríkska landsliðið er favorittur undan einum dysti, og tí má hann arbeiða eyka nógv við eysturríksku spælarunum, fyri at fyrireika teir optimalt til uppgávuna ímóti Føroyum leygardagin. Yvirfyri Der Standard undirstrikar eysturríkski venjarin, at hann hevur eisini stóra virðing fyri tí arbeiðnum, sum føroyski landsliðsvenjarin, Brian Kerr hevur lagt fyri dagin.